# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 25.01.2016*

**Bygdaráðsfundur 25.01.2016 kl. 16.30 til kl. 20.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | forfall |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 1/2016 Havnir**
J.nr. 08.14.00 – Ø09-3-15
**Málslýsing**
Rakstraræætlan fyri 2016 hjá Kongshavnar Havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Høvuðstølini í fíggjarætlanini eru hesi:**

| **Inntøkur:** | **Ætlan 2016** | **Ætlan 2015** | **Ætlan 2014** |
|---|---|---|---|
| Netto inntøkur | 637.500,00 | 450.750,00 | 684.848,31 |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Netto útreiðslur | -293.750,00 | -310.750,00 | -289.829,69 |
| Rentuinntøkur | 2.000,00 | 2.000,00 | 2.394,94 |
| **Ársúrslitið** | **345.750,00** | **142.000,00** | **397.413,56** |

**Tilmæli**
Á fundi 20.01.2016 mælir Fíggjarnevndin til, at viðmæla rakstraræætlanini, hjá Kongshavnar Havn, fyri 2016.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 2/2016 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi 07.01.2016 søkir Tofta Ítróttarfelag um fíggjarliga stuðul fyri 2016, kr. 200.000,00 til vaksnamannadeildina og kr. 150.000,00 til ungdómsdeidina.

**Tilmælir**
Á fundi 18.01.2016 mælir Mentanarnevndin til at játta Tofta Ítróttarfelag fíggjarligan stuðul áljóðandi, kr. 200.000,00 til vaksnamannadeildina og kr. 150.000,00 til ungdómsdeildina.

Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

Á fundi 20.01.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini. Peningurin verður tikin av stovninum stuðul til ítrótt.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 3/2016 Frítiðarvirksemið**
J.nr. 18.20.00G01-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi 12.01.2016 søkir Tofta Talvfelag um fíggjarligan stuðul fyri 2016, eins og kommunan hevur gjørt undanfarin ár.

**Tilmælir**
Á fundi 18.01.2016 mælir Mentanarnevndin til at játta stuðul til Tofta Talvfelag áljóðandi kr. 12.000,00.

Á fundi 20.01.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini. Peningurin verður tikin av stovninum stuðul til ítrótt.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 4/2016 Bygningsregulering, grundstykir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-6-15
**Málslýsing**
Í skrivi 20.10.2015 søkir Dánjal Olsen um loyvi til at byggja uppí sethúsini í Kúluni matr.nr. 714 Tofta bygd. Sum tekningin á suðurendanum vísir, so er ætlanin at hava eitt takhall á umleið 10 stig á nýbygninginum niðaneftir. Bygt verður 2 m eystureftir og 2 m norðureftir.

Gomlu húsini verða annars høvuðsumvæld, men við sama sniði og mátum. Tó verða vindeyguni við sprossum.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 25.01.2016*

**Tilmæli**
Á fundi 14.01.2016 mælir Tekniska nevnd til, at umsøkjarin fær loyvi til at byggja uppí sethúsini á matr. nr. 714, og at bygt verður eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 5/2016 Vegir og ferðsla**
J.nr. 05.13.09-P20-1-15
**Málslýsing**
Í skrivi 14.12.2015 heitir borgari undir Nesinum á kommununa, um at fáa sett eina autoverju upp við tann ytra partin av vegnum undir Nesinum, har høgt oman av.

**Tilmælir**
Á fundi 14.01.2016 mælir Tekniska nevnd til, at autoverjan uppá 57 m, verður gjørd í tí ytra endanum undir Nesinum, samb. kostnaðarmeting frá Tekniska leiðaranum, áljóðandi kr. 50.000,00 uttan mvg, og at arbeiðið verður gjørt av arbeiðsfólkið hjá kommununi.

Á fundi 20.01.2016 tekur Fíggjaranevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum vegir.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 6/2016 Veitingarvirksemið el, vatn o.a**
J.nr. 13.02.00-G01-1-16
**Málslýsing**
Kommnan hevur biðið um tilboð frá Nomatek uppá eitt grov filtur til reinsiverkið.

Tilboðið uppá filtri er áljóðandi kr. 68.500,- við mvg.

Mettur kostnaður av uppsetan og eykalutum er uml. kr. 14-16.000,- við mvg.

**Tilmælir**
Á fundi 14.01.2016 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá Nomatek.Samlaður kostnaður er mettur til kr. 84.000,00 við mvg.

Á fundi 20.01.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum vatnveiting.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 7/2016 Vegir og ferðsla**

J.nr. 05.04.00-P20-1-16

**Málslýsing**

Nes kommuna hevur fingið áheitan frá borgarum, úr Saltnesi og undir Nesinum, um at gera eina gøtu frá undir Nesinum og oman í Rókaveg á Saltnesi.

Nes kommuna hevur ætlanir um at gera gøtuna, og í tí samband er neyðugt at fáa loyvi frá festarum og leigarum.

**Tilmæli**

Á fundi 14.01.2016 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan fær neyðugu loyvir, frá festarunum og leigarunum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 9/2016 Bygningsregulering, grundstykir og reglugerðir**

J.nr.02.34.02-P20-9-15

**Málslýsing**

Í skrivi 12.11.2015 søkir Petur J. Petersen um loyvi at ogna sær lendi til eitt grundstykki í Saltnesi. Økið er sunnanfyri Gráastein, burtur av leigutrøðni matr. nr. 316a.

Umsøkjarin biðjur um loyvi til at ogna sær 918 m² burtur av matr. 316a Tofta bygd, til gtundstykki.

**Tilmæli**

Á fundi 14.01.2016 mælir Tekniska nevnd til, at umsøkjarin fær loyvi til at ogna sær lendið, til grundstykkið, sum biðið verður um.

At Nes kommuna í hesum sambandi ognar sær lendið til at selja víðari til umsøkjaran.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 10/2016 Vegir og ferðsla**

J.nr.05.09.00-P20-1-16

**Málslýsing**

Í skrivi 10.01.2016 heita borgarar við Regnavegin á kommununa um at gera eitt parkeringsøki. Víst verður á, at tað er ógvuliga trongligt á Regnavegnum serliga innarliga á vegnum, har alt fleiri húskir og bilar leggjast afturat.

**Tilmælir**
Á fundi 14.01.2016 mælir Tekniska nevnd til, at tekniska deild hyggur uppá møguleikan fyri parkeringsøki á Regnavegnum, og ein kostnaðarmeting verður gjørd.

At tað samstundis verður hugt eftir møguleikanum til parkeringsøki úti í Gerðinum á Nesi, og ein kostnaðarmeting verður gjørd.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 11/2016 Vegir og ferðsla**
J.nr. 05.01.00-P20-1-16
**Málslýsing**
Á bygdaráðsfundi 23.03.2015 var samtykt, at gongubreytin við Lýðarsveg skuldi verða dagførd og gjørd liðug av kommununi. Hetta var viðgjørt í samb. við, at FT-net fekk loyvi til at grava á Lýðarsvegi.

E.M Asfalt skal gerða arbeiðið fyri FT-net við at asfaltera innkoyringar til verandi sethús á Lýðarsvegi.

Tekniski leiðarin hevur biðið um tilboð frá E.M. Asfalt uppá asfaltering av gongubreytini á Lýðarsvegi. Tilboðið uppá asfaltering av gongubreyt við Lýðarsveg er áljóðandi kr. 148.750,00 við mvg.

**Tilmælir**
Á fundi 14.01.2016 mælir Tekniska nevnd til, at arbeiðið, við at asfaltera gongubreytina á Lýðarsvegi, verður gjørt, og tikið verður av tilboðnum frá E.M. Asfalt áljóðandi kr. 148.750,00 við mvg.

Á fundi 20.01.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum vegir.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt.

**Mál nr. 12/2016 Ognir og hølir**
J.nr. 82.07.00 – P0-1-15
**Málslýsing**
Setrini til áskoðaraplássini, á Svangaskarði, eru illa farin og mugu skiftast út. Nýggj setur kunnu fáast fyri kr. 100,- pr. stk. umframt frakt og mvg. Ætlanin er skifta 1000 setur og brúka verandi stativir.

Av tí, at tað er trongligt millum setrini, er ætlanin at taka aðruhvørja rekkju burtur.

**Tilmælir**
Á fundi 14.01.2016 mælir Tekniska nevnd til at keypa 1000 nýggj setur, til Svangaskarð.

Á fundi 20.01.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

Mett verður, at pláss er, fyri keyp av nýggjum setrum, innan verandi karmar, í samb. við útbyggingina av B68 húsinum.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 13/2016 Bygningsregulering, grundstykir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02 – 20-2-16
**Málslýsing**
Í skrivið 19.01.2016 søkja Helena Hansen og Janus Trúgvason um byggiloyvi til sethús, á matr.nr. 474p Tofta bygd.

Húsini eru 141 m² til støddar í tveimum hæddum, kjallara og miðhædd, og bilhús 46 m² til støddar.

**Tilmæli**
Á fundi 22.01.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta umsøkjarunum byggiloyvi til sethús og bilhús á matr. nr. 474p eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.